## Grønlandsbankin til Danmarkar

Leiðslan í Grønlandsbankanum hevur sett sær fyri at gera eina roynd at fáa danir at seta pengar inn á konto í bankanum. Afturfyri skulu teir fáa góða rentu. Blaðið Sermitsiaq skrivar, at bankin ætlar sær fyrst og fremst at fáa privatfólk at seta pengar í bankan, men at fyritøkur fáa eisini tilboð. Tey, sum seta millum 100.000 og fimm milliónir krónur á bók, fáa upp í 3,75 prosent í rentu, men tilboðið er bara galdandi til hálvan desember. Sermitsiaq skrivar, at Grønlandsbanken hevur 60.000 viðskiftafólk, og at av teimum hava umleið 1.000 bústað í Danmark.



## Danskt avlop

Danmark hevði 8,4 milliardir krónur í avlopi á gjaldsjavnanum í september. Tað vísa tøl hjá donsku hagstovuni. Avlopið er at kalla tað sama sum í september í fjør, tá tað var 8,8 milliardir. Av avlopinum í september stavaðu góðar seks milliardir krónur fyri vørum og tænastum. Danska hagstovan sigur, at teir seinastu tólv mánaðirnar hevur Danmark havt 55,3 milliardir krónur í avlopi á gjaldsjavnanum. Tað er væl meiri enn teir tólv mánaðirnar frammanundan. Tá var avlopið góðar 41 milliardir krónur, sigur hagstovan í Keypmannahavn.

# Landskassin skal tryggja húsaeigarum bílig lán

**- Einasti heilivágurin ímóti náiðlesysu jagstranini hjá bankunum eftir vinningi, er at seta teir undir trýst, segði Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins**

LANDSSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Føroysku bankarnir liva í einum smørholi, tí teir hava onga kapping og tað merkja føroyskir sethúsaeigarar og føroyskt vinnulív sviðan av, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins*

- Tey næstu árini kann tað blíva eitt projekt hjá Javnaðarflokkinum at tryggja vanligum fólki bíligari sethúsalán enn teir fáa frá bankunum.

Tað staðfesti Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins í formansfrágreiðin síni á landsstevnu floksins á landsstevnuni.

Hann staðfesti, at fyri at fáa glið á gjaldførisstreymin aftur í kreppuni og fyri at at fáa meira virksemi millum brúkararnar, hava tjóðbankarnir støðugt sett stuttu rentuni niður. Úrslitið er, at í dag er danska tjóðbankarentan 1,25%.

- Tíverri er hetta ikki í sama mun komið okkara egnu sethúsaeigarum ella vinnulívið til góðar. Rentumarginalurin í bankunum er hin vegin seinastu tvey árini øktur nærum 1%, og útlánsrentan til vinnuna er eisini hækkað.

- Vanligu sethúsaeigarar og ikki minst føroyskt vinnulív eru hart kroyst av høgu útlánsrentuni. Men tað sigur seg sjálvt, at skal ein banki vinna eina hálva millión um dagin í egnan lumma, bara upp á ein part av heimamarknaðinum og ikki aðrastaðni frá, so má tað merkjast onkustaðni.

- Onkustaðni skulu pengarnir koma frá og teir koma frá hart trongdum sethúseigarunum og frá einum hart trongdum vinnulívi, sum tíverri ikki hava møguleika at leita stórt bíligari lán upp her um leiðir, segði formaður Javnaðarfloksins.

### Bara ein heilivágur

- Tí er einasti heilivágurin ímóti hesum náðileysa yvirskotsjagstranini, at teir verða settir undir trýst av kapping.

- Sum er liva teir í einum smørholi, har eingin kapping er. Har er eins lítil kapping sum millum tey feløg, sum selja olju.

Jóannes Eidesgaard segði, at tí hevði tað verið eitt hugskot, at tað almenna við Húsalánsgrunninum og Realinum og við teimum 600 milliónum krónunum, sum fingist hevði fyri seinasta triðingin av Føroya Banka, settu á stovn eitt alment realkredittfelag, sum veruliga kundi givið føroyskum sethúseigarum eina eins góða fígging, sum sethúseigarar fáa í londunum rundan um okkum. Tað hevði veruliga munað hjá tí einstaka húskinum.

- Peningastovnarnir kundu tá heldur brúkt meira orku til at fíggja vinnulív, legði hann afturat.

## Javnaðarflokkurin vil framtíðartryggja vælferðina

- Størsta politiska avbjóðingin hjá Javnaðarflokkinum er at framtíðartryggja vælferðina.

Tað staðfestir fokkurin í yvirlýsing, sum varð gjørd á landsstevnuni hetta vikuskifti.

Og flokkurin leggur afturat, at fyri at røkka hesum máli, er eisini neyðugt at framtíðartryggja búskapin, tí vælferð og búskapur hanga neyvt saman.

Flokkurin sigur, at tilvildarligar skerjingar á fíggjarlógini fremja ongan framburð. Heldur skulu vit taka burtur útreiðslur, sum als ikki hoyra heima á einari fíggjarlóg, eitt nú stuðulsskipanir og bygnaðarligar skeivleikar.

Og ikki minst ræður tað um at útvega landinum størri inntøkur á samhaldsføstum grundarlag. Skattastigin skal gerast rættvísari, og harumframt eigur skattagrundarlagið at breiðkast við t.d. tilfeingisgjaldi, skatting av samfelagsskaptum vinningi og umhvørvisgjøldum.

Annars fegnast Javnaðarflokkurin, at tað eru gjørd stór framstig á útbúgvingarøkinum, at samhaldsføst heilsutrygging verður sett á stovn, at arbeiðsloysistryggingin er styrkt munandi, eins og at batar eru gjørdir í barsilsskipanini.

## Javnaðarflokkurin vil leggja kommunur saman við lóg

Stendur tað til Javnaðarflokkin, verða kommunurnar sum skjótast lagdar saman við lóg.

Tað staðfestir flokkurin í yvirlýsing, sum varð fráboðað eftir landsstevnuna nú um vikuskifti.

Landsstevnan ger greitt, at hon tekur undir við, at ein kommunureformur verður settur í verk. Men treytirnar eru, at varsemi verður víst, tá tað ræður um at leggja tær mest grundleggjandi vælferðartænasturnar út til kommunur, ið enn ikki hava sæð dagsins ljós.

Hinvegin eigur støða beinanveg at verða tikin til framtíðar kommunala Føroyakortið við lóg, er niðurstøðan á landsstevnuni hjá flokkinum.

Kortini tekur flokkurin ikki undir við, at næsta kommunuval skal vera um eitt ár, soleiðis sum kommunubólkurin hjá innlendismálaráðnum er komin til.

Javnaðarflokkurin heldur sostatt, at næsta kommunuval eigur ikki at vera fyrr enn til ásettu tíð, tvs á næsta regluliga kommunuvalið seinast í 2012.

- Hetta vil geva nýggju kommunum tíð til at skipa síni samstørv, sigur Javnaðarflokkurin og leggur afturat, at allur skattur eigur at vera samhaldsfastur og stigveksandi (progressivur).